# 3500 fólk um fjørðin

**Strandferðslan setti inn eykaskip í samband við Ovastevnuna. Og tað gav eisini úrslit**

STEVNA
*Snorri Brend*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*

**Nólsoy:** Seinasta vikuskifti varð Ovastevnan hildin í Nólsoy.

Skuldi ein ganga eftir talinum av fólki í fjør, so ynskti Strandferðslan eisini at gera sítt til, at fólk aftur í ár skuldu sleppa lættliga um fjørðin.

Umframt Rituna, ið dagliga røkir hesa farleiðina, so setti Strandferðslan somuleiðis Ternuna inn í rutusigling um vikuskiftið.

Og tá talt varð upp mánamorgunin høvdu hesi bæði skipini flutt júst 3.500 ferðafólk um fjørðin.

Uppgerðin frá Strandferðsluni vísir, at Ritan flutti 217 fólk um fjørðin fríggjadagin, 228 leygardagin og 601 sunnudagin.

Hinvegin flutti Ternan leygardagin – t.v.s. fram til midnátt – 1037 fólk um fjørðin. Her kann ein ganga út frá, at tey flestu teirra fóru á stevnuna.

Og sunnudagin flutti so Ternan 1417 fólk, harav tey allarflestu mundu vera á heimleið eftir lokna stevnu.

Av Strandferðsluni verður upplýst, at eingir bilar vórðu fluttir. Bert ferðafólk.

Eingin veit við vissu, hvussu nógv fólk vóru á ársins Ovastevnu. Men skal ein rokna út frá fluttum ferðafólkum við Strandferðsluni, og teim nógvu smábátunum, so er ikki nógvur ivi um, at eins nógv fólk mundu vera til tey mongu ymisku tiltøkini á stevnuni í ár.


*Nógv fólk var samankomið til stevnuna í ár. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn – og í Nólsoy – setti stevnuna leygardagn*


*Umframt tey fólkini, sum Strandferðslan flutti út í Nólsoynna, so vóru eisini hópurin av smábátum at síggja í havnalagnum*


*Við setanina sang Nólsoyar Sangkór*

# Truckarar hittast til festival



**Í løtuni verður arbeitt við fyrireikingini til ársins Trucker-festival í Runavík. Tiltakið eydnaðist sera væl í fjør, og tí er lítil ivi um, at hesin festivalurin er komin fyri at vera. Runavíkar kommuna hevur eisini víst tiltakinum stóran áhuga**

BILAR
*Snorri Brend*

Enn eru slakar tvær vikur til festivalin, men tíð er longu nú hjá teimum áhugaðu at melda seg til.

Sambært heimasíðuni hjá felagnum so eru higartil tveir lastbilar og tveir kranabilar meldaði til. Men pláss er kortini fyri enn fleiri førum, bæði forvognum, trailarum og kampingbilum.

Trucker-festivalurin hevur tvey tey seinastu árini verið fyriskipaður á einum øki, nærhendis oljutangunum við Beta á havnalagnum í Runavík..

Men í ár verður hann fluttur til betri egnað stað.

Borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen hevur nevniliga arbeitt við at útvega eitt annað gott øki til festivalin. Og tað hevur í roynd og veru eydnast.

Herfyri frættu so fyrireikarnir, at festivalurin í ár kann fyriskipast á einum innihegnaðum øki, har farmaskipini avskipa teirra bingjur.

- Hetta merkir aftur, at vit kunnu veita luttakarunum eitt betri øki, og samstundis eisini eitt størri øki, verður sagt á heimasíðuni hjá fyrireikarunum.

# Færri útlendsk fiskifør í juli mánaði

**Fáir útlendskir fiskidagar vóru í føroyskum sjógvi í farna mánaði, - einans 366, harav russisk skip áttu 166 teirra**

Eitt yvirlit um útlendsku veiðuna í føroyskum sjóøki vísir, at bert skip úr fýra londum royndu í føroyskum sjógvi í juli mánaði.

Skipini, ið royndu í okkara øki vóru úr Bretlandi, Fraklandi, Russlandi og úr Noregi.

Útlendsku skipini veiddu íalt sløk 8.000 tons, og av hesum veiddu tey russisku størstu nøgdina, nevniliga 5.500 tons av makreli.

Annars er bert talan um smærri nøgdir av øðrum fiskasløgum, so sum sild, svartkjaftur, longa og blálonga.

Hinvegin er ikki ein einasti stertur av blálongu og prikkafiski veiddur, og heldur eingin brugdulivur tikin.

Samanlagt hava útlendsk fiskiskip veitt 333.436,3 tons frá ársskiftinum og fram til 1. august.

*sb.*